## Ótrúligur næstformaður

Ísraelsku tíðindafólkini til føroysku venjingina mundu ikki trúð sínum egnu oyrum..

Spurningurin, sum júst hevði verið settir føroysku umboðunum, var, hvør hasin maðurin var, sum støðugt rann umgang fyri umgang venjingarvøllin hjá føroyska liðnum.

Tá svarið so var, at talan var um næstformannin í FSF, høvdu teir hug at flenna.

- Hevði okkara næstformaður runnið soleiðis kring vøllin til venjingar, so høvdu fleiri sjónvarpsstøðir helst sent beinleiðis.

Somikið stóra hildu teir hendingina vera, og so nyttaði lítið at siga, at Niklas er fyrrverandi dómari, og at honum snøgt sagt dámar at vera í góðari venjing.

Um teir ikki trúðu hesi frágreiðing, ella um teir hildu føroyingarnir lúgva, er ikki víst, men í øllum førum mátti Niklas sjálvir yvir at greiða frá fyri tíðindafólkunum, at soleiðis hekk tað nú einaferð saman. Og so høvdu ísraelsku støðirnar nakað óvanligt at senda til hyggjarar og lurtarar sínar.

**- mørk**



*Eftir loknan rennitúr mátti pøsti næstformaðurin greiða bilsnu miðlunum frá, at honum snøgt sagt dámdi at vera í góðari venjing*

## Væta, væta og aftur væta



Í nógva hitanum er tað sjálvsagt, at nógv væta skal til, skulu føroysku spælararnir verða til reiðar at tuska á vøllinum í samfullar 90 minuttir.

Tí hava teir eisini frá fyrsta degi fingið at vita, at tað ræður um at drekka vatn. Nógv vatn. Ikki minst er tað týdningarmikið, at kroppurin skjótast gjørligt verður vandur til at taka ímóti so nógvari vætu, sum tað yvir høvur er gjørligt, tí eisini hetta er nakað, sum tekur tíð, tá dagliga inntøkan av vætu brádliga skal tvífaldast.

Roknað verður við, at hvør spælari skal drekka einar seks litrar av vætu um dagin, um javnvágin í kroppinum skal haldast viðlíka, og roynt verður eisini at akta boðini.

Heilt uttan trupulleikar var hetta tó ikki, og í einum tveimum førum noyddust spælarar snøgt at steðga venjingini eina løtu, tí persónlig ørindi skuldu avgreiðast.

**-mørk**

## Vilja vinna stórt

Kravið til ísraelska liðið er greitt undan dystinum leygardagin. Teir skulu vinna, og helst skulu teir vinna stórt.

Í løtuni er støðan nevnliga tann, at Ísrael og Sveis liggja lið um lið á øðrum plássinum, men takkað verið stórsigrinum á Føroyum í Basel hevur Sveis ein málmun, sum er seks mál betri. Tí skulu ísraelsmenn vinna dystin móti Føroyum við seks málum, um Sveis megnar at spæla javnt móti Fraklandi, og sum skilst á miðlunum, so verður tað eisini hetta, sum farið verður eftir á vøllinum.

Hinvegin er ein tepur 1-0 sigur nóg mikið, skuldi tað víst seg, at Frakland megnar at vinna á Sveis, men ísraelsmenn vilja helst, at avgerðin í mest møguligan mun verður í egnum hondum.

**-mørk**

# Klárur at taka møguleikan



*Hóast botnstríðið í Klaksvík, so heldur Heðin á Lakjuni á ongan hátt, at hann er verri fyri í ár, enn hann var tað í fjør*

**Heðin á Lakjuni hevur fyri tað mesta verið skiftisspælari á landsliðnum, men hesa ferð tykist tað vera rúm fyri KÍ-liðformanninum millum teir fyrstu ellivu. Og sjálvur ivast hann ikki í, at hann er til reiðar at taka av møguleikanum**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

**Tel Aviv, Ísrael:** Hóast hann undir landsliðsleiðsluni hjá Henrik Larsen hevur verið bæði inni og úti, so er Heðin á Lakjuni kortini ein av spælarunum, sum við tíðini má sigast at hava fingið hampuliga drúgvar royndir í landsliðshópinum.

Ikki minst tóktist hann í fjør bíta seg alt meira fastan í landsliðshópin Men hóast hann í fleiri umførum stóð seg rættiliga væl, so var tað bert ta einu ferðina - á heimavølli móti Írlandi, at kviki klaksvíkingurin hevði pláss millum teir fyrstu ellivu í undankappingardysti.

### Tøvur á kantum

Hesa ferð verður tó gitt frá fleiri síðum, at tað verður rúm fyri Heðini í byrjunaruppstillingini. Skaðin hjá Jákupi á Borg viðførir í øllum førum, at ein nýggjur kantur skal inn á liðið, og roknast kann við, at valið hesa ferð fellur á Heðin, meðan Claus Bech Jørgensen so verður fluttur yvir á høgra borð.

- Sjálvur vóni eg í øllum førum, at valið kann fella á meg hesaferð, og eg haldi eisini, at møguleikin skuldi verið har.

Tú hevur annars verið eitt sidnur on og off hesi seinnu árini. Hevur tað verið ein strævin leiklutur at hava.

- Tað hevur kanska ikki verið heilt soleiðis, sum eg sjálvur hevði vónað. Men eg havi støðugt verið ein partur av hópinum, kortini. Og seinastu dystirnar eri eg ofta skiftur inn, so tað hevur gingið rætta vegin. Og sleppi eg at byrja inni hesaferð, so vildi tað verið ógvuliga stuttligt, heldur hann.

Ein av avgjørdu styrkjunum hjá Heðini hevur altíð verið skjótleikin. Í øllum førum, tá spælt hevur verið í heimligu kappingini. Móti útlendskum spælarum er tó ikki altíð, at tann fyrimunurin er so stórur, men júst í dystinum móti Ísrael tóktust føroyingarnir møta einum liði, sum ikki hevði heilt so stórar fyrimunir á hesum økinum. Og júst hetta kann uttan iva vera ein av fremstu orsøkunum til at seta Heðin á vøllin frá fyrsta bríksli.

- Nú fekk eg so stutta tíð á vøllinum seinast, so tað var avmarkað, hvat eg fekk roynt. Men eg haldi avgjørt, at teir vóru til at tosa við, og teir vóru ikki heilt so kvikir, sum fleiri av hinum mótstøðuliðunum hava verið. So fái eg kjansin, so rokni eg við, at eg klári at koma ígjøgnum í borðinum onkrar ferðir.

### Sjálvsálitið er intakt

Sum ein av týdningarmestu monnunum á KÍ-liðnum í ár kann spurnartekin kanska setast við, hvørt Heðin í løtuni er í nóg góðari javnvág sjálvur. Hetta skilt soleiðis, at tað mangan er nakað væl strævnari at spæla við einum liði, sum er partur av botnstríðnum, heldur enn at fáa tað sálarliga yvirskotið, sum ofta fylgir við einum plássi í oddinum.

Tað kann í øllum førum fáa spælarar at ivast í egnu dygdum sínum, men hetta er tó als ikki nakað, sum Heðin tykist vera samdur í.

- Sjálvandi hava vit havt tað øgiliga tungt í Klaksvík í ár, og sjálvur havi ongan tíð áður roynt at verið í beinleiðis niðurflytingarstríði. Men fyri tað kenni eg meg at vera væl fyri. Uppleggið til dystirnar hjá okkum eru kanska øðrvísi nú, enn tey vildu verið, um vit vóru frammi í oddinum, men tað er so bara nakað, sum tú mást læra at liva við.

- Og eg haldi eisini, at sjálvsálitið er í lagi. Eg kenni meg í øllum førum at vera eins væl fyri í ár, sum eg var tað í fjør, men umstøðurnar at spæla eru sjálvandi øðrvísi. Liðið, sum eg spæli á í ár, er kanska ikki heilt so sterkt, og tí fái eg sjálvur kanska ikki heilt so nógv burturúr. Men eg haldi ikki, at tað skal tulkast tann vegin, at eg eri ein verri spælari nú, enn eg var í fjør. Og í ávísan mun er talan kanska um tað øvugta. Higartil í ár havi eg í øllum førum skotið níggju mál, meðan tað í fjør bara varð til sjey, so heilt galið hevur tað ikki verið hóast alt. Tá spældi eg enntá í álopinum fyri tað nógva, meðan eg í ár havi spælt á miðvøllinum. Og verður tú úttikin til hópin, so er tað væl eisini so, at venjararnir rokna við, at tú kanst gera nakað gott, staðfesti Heðin at enda.